# KT2004 síðurnar

Í hesum og komandi bløðum setir Sosialurin sjóneykuna á stevnuna KT2004, sum verður í Norðurlandahúsinum 22. og 23. apríl. Fyrilestrar verða umrøddir, og virkini verða lýst.



Høvuðstuðlar
ATLANTIC AIRWAYS
bp
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari
Microsoft

# Fjølbroytt fyritøka við góðum útsýni

**Farodane er heildarveitari av loysnum innan kunningartøkni og skrivstovuhald, og virksemið fevnir víða. Á kunningarráðstevnuni fer Faro-dane at leggja dent á KT-trygd, fíggjarstýring og aðrar tænastur, ið serliga venda sær til virki og fyritøkur**



Einaferð í 80-árunum seldi Farodane bæði taffelchips og mikrochips. Heilsølan, sum varð stovnað fyri yvir 50 árum síðan, stóð á einum vegamóti, og endin varð, at skrivstovuútbúnaðurin og teldutøknin vann á mat- og kolonialvørunum.

Í dag bjóðar Farodane seg fram sum heildarútvegara til skrivstovuna. Fyritøkan stendur á fýra beinum og veitir loysnir innan kunningartøkni, innbúgv, skrivstovulutir og skeiðtænastu.

Annað ættarlið hevur tikið yvir og triðja ættarlið førir fyritøkuna inn í nýggjar tíðir. Ein av stovnarunum og stjóri í 40 ár, Carl Herup Olsen, er enn í felagnum sum nevndarformaður. Ólavur Herup Olsen er forstjóri, og sonur hansara Rolf Herup Olsen er KT-stjóri.

Trý ættarlið, sum standa á odda fyri umleið 45 starvsfólkum í Farodane. Í dag er kunningartøknin hornasteinurin í virkseminum, og eini 30 fólk starvast burturav við veitingum í kunningartøkni.

Næstu árini fara vit at síggja herd krøv til KT-trygd. Nýggj lóggáva og tøkni er ávegis, og serliga tað almenna fer at noyðast at seta orð á ein KT-trygdarpolitikk, sum sigur, hvussu farast skal fram við kunningartøknini. Farodane hevur brynjað seg til hesa tíðina, og á KT-stevnuni verður trygdin eitt av evnunum, sum Farodane fer at taka fram.

Eitt annað øki, sum Farodane fer at leggja stóran dent á, er fíggjarstýringin og bókhald. Virkið er farið inn í eitt nýtt samstarv við Visma Software, sum eru størst á økinum í Noregi og í løtuni víðka til restina av Norðurlondum. Farodane ásannar, at marknaðurin eftirspyr fleiri og betri fíggjarstýringsamboð, og tí er fyritøkan vorðin føroyskt umboð hjá Visma.

Heimasíðurnar eru eisini ein sjálvsagdur partur av virkseminum hjá Farodane. Farodane bjóðar millum annað sína egnu CMS-skipan til sínar kundar, og trý fólk taka sær burtur av at menna og viðlíkahalda heimasíðuskipanir.

Farodane hevur eisini lagt stóran dent á at vera ein álítandi netumsitari fyri fyritøkur. Serkøn fólk taka sær av rakstri og umsitingini av netumhvørvinum hjá fleiri smærri og størri fyritøkum, og tað samstarvið hevur riggað væl.

Á KT-stevnuni fer Farodane at vísa fram, hvat skeiðtænastan Kvasir hevur at bjóða. Kvasir bjóðar eitt nú teldukoyrikort, men eftirhondini hevur skeiðtænastan lagt seg meira eftir grafiskum skeiðum. Kvasir verður ofta biðið um at halda alskyns skeið úti hjá kundum, og menningarskeið í leiðslu, sølu og tænastu eru á skránni uppi á Skotarók við útsýni yvir Havnina.

Útsýnið hevur víst seg at verið gott í Farodane, sum varð stovnað í 1950. Fyritøkan hevur prógvað, at hon megnar at flyta seg við teimum skiftandi krøvum, sum tíðin hevur við sær, og fyritøkan verður eisini í morgin ein álítandi samstarvsfelagi, lovar Rolf Herup Olsen, KT-stjóri og triðja ættarlið í Farodane.

FARODANE

Stjóri: Ólavur Herup Olsen
Stovnað: 1950
Starvsfólk: 46
Virksemi: Kunningartøkni, innbúgv, skrivstovulutir og skeiðtænasta

# Heimamarknaðurin breyðføðir og gevur hugskot

**Uttan ein góðan heimamarknað var eingin útflutningur, og føroyski brúkarin eigur sín lut í, at vit vera so væl móttikin úti í heimi, sigur Fróði Magnussen, stjóri á Formula.fo**

Formula.fo er helst tað KT-virkið í Føroyum, sum oftast hevur verið í yvirskriftunum fyri serlig avrik síðstu árini.

Á Vinnudegnum varð Ársins átak 2003 latið Formula.fo fyri menningina av TotalView, sum er ein talgild vekslaraskipan. Tað var serliga avtalan við teldurisan Siemens um marknaðarføring uttanlands, sum vakti ans.

Seinni er komið fram, at Formula.fo hevur fingið stóra avtalu í lag um sølu av ritbúnaði til tey fimm sjúkrahúsini í Storstrøms amt. Har búgva seks ferðir so nógv fólk sum í Føroyum, og allir stovnarnir í amtinum skulu eftir ætlan nýta skipanina PatSec. Hetta fekk fólk at kalla ordran fyri eitt satt frambrot.

Dømini vísa, at Formula.fo hevur gingið undan og prógvað, at tað ber til hjá føroyingum at útflyta kunningartøkni, um rætt verður atborið. Líkt er til, at Formula.fo hevur fingið fótin fastan uttanlands, men heimamarknaðurin er framvegis grundarlagið, leggur Fróði Magnussen eina við.

— Sjálvandi vilja vit royna at skapa útflutning, men tað verður gjørt við útgangsstøði í heimamarknaðinum, sum breyðføðir okkum og gevur okkum hugskot. Uttan eina sterka støðu á føroyska heimamarknaðinum, har kundarnir eru okkara ráðgevarar, so høvdu vit onki at útflyta. Hinvegin er okkara útflutningur við til at draga góð starvsfólk til okkara, sum so aftur styrkir okkara støðu í Føroyum, sigur Fróði Magnussen.



Ársins átak 2003 varð latið Formula.fo fyri menningina av TotalView

Tá ið Formula tosar um heimamarknað, so er talan ikki bara um Føroyar. Øll Norðurlond eru heimamarknaðurin. Føroyar eru sjálv rannsóknarstovan. Føroyingar seta høg krøv, og hóast talan er um eitt lítið land, so hava Føroyar somu eyðkenni sum onnur framkomin lond.

Fróði Magnussen heldur, at tað er ein styrki í Føroyum, at tað er so stutt millum kunda og virki. Haraftrat er tað ein styrki, at føroyingar eru so smidlig arbeiðsmegi. Á Formula leggja tey stóran dent á at arbeiða tvørtur um deildir, og tí sær starvsfólkið allan sjónarringin. Hesi bæði tingini samanløgd gera, at støðið verður tikið í tørvinum hjá kundanum, og tí eigur føroyski brúkarin lut í útflutninginum hjá Formula.

Dømi um hetta eru forritini PatSec og TotalView, sum hava vunnið Formula heiður. Forritini eru ment beinleiðis til føroyska marknaðin. Ein tørvur verður staðfestur, og tann uppgávan verður loyst. Aftaná vísir tað seg, at vit í Føroyum ikki eru tey einastu, sum hava sama tørvin, men av tí, at Føroyar eru eitt lítið, avmarkað samfelag við eyðkennum hjá altjóða londum, so ber væl til at selja øðrum somu tænastu.

— Skjótleikin, smidleikin og nærleikin er okkara stóri fyrimunur, sigur Fróði Magnussen.



# Tænastan skal nærri borgaranum

**Stór menning er hend við elektroniskari skjalastýring seinastu árini. Á ársins KT-stevnu fer Formula.fo at vísa tað nýggjasta á økinum og vísir, hvat framtíðin hevur at bjóða.**

- Málið er at fáa tænastuna nærri til brúkaran. Skjalastýringin skal økja tænastuna til borgaran og fer at snúgva seg meira um, hvat ein stovnur ella ein fyritøka kann bjóða borgarum og ikki so nógv um, hvussu stovnurin skipar seg inneftir, sigur Edvard Remberg, stjóri á Formula.fo.

Skjalastýring er eitt týdningarmikið amboð serliga hjá almennum stovnum, tí teir hava skyldu til at skjalprógva og skjalfesta allar avgerðir. Upprunaliga var talan um eitt fysiskt skjalasavn. Seinni hava tey flestu fingið eina elektroniska journal, og pappírsgoymslan er nógvastaðni slept. Áður var ikki gjørligt at skanna pappír, tí goymslan var ov lítil, men telduorkan ger, at tann trupulleikin er burtur.

Formula.fo hevur longu nógv ár á baki við skjalastýring og hevur seinastu tíggju árini góðar royndir við skipanini DocuLive, sum er ment av Software Innovasion. DocuLive, sum byrjaði við NoArk, verður nú til Grow Business Solution, og framtíðin sær spennandi út.

Málið við skjalastýringini er at økja tænastustøðið. Tað kann gerast við, at ein stovnur hevur ein portal, har borgarin sjálvur kann avgreiða einfaldar tænastur. Hann kann sjálvur skráseta síni børn til fyrsta flokk, søkja um grundstykki, søkja um ansingarpláss og so framvegis. Alt samdøgrið.
Í staðin fyri javnan at ganga á stovnin, kann borgarin so fylgja sínum máli, síggja hvar tað liggur, og hvussu gongst við at fáa tað avgreitt. Harvið lætnar arbeiðsbyrðan hjá stovninum, og tænastustøðið verður betri.

Skjalastýring í framtíðini verður meira intelligent, og karmarnir verða flótandi fyri, hvat er skalastýring, og hvat er er onnur dátuviðgerð. Málini verða sjálvlærandi. Tað skal skiljast soleiðis, at skipanin leitar eftir fordømum, so málsviðgerðin hevur lættari við at taka eina avgerð, sum er rættvís.

Danski staturin hevur stungið út í kortið, hvussu skjøl skulu handfarast í framtíðini, og Grow Business er ein partur av hesum. Grow Business er soleiðis hættað, at tú kanst byrja spakuliga og víðka skipanina so líðandi. Tú kanst byrja spakuliga, hóast tú hugsar stórt.

Skipanin verður sett í verk í løtuni og fer í framtíðini at loysa Doculive av. Á KT-stevnuni fer Formula at vísa fyrsta stigið á leiðini, WWW SAG.

formula.fo

Stovnað: 1986
Starvsfólk: 65
Stjóri: Torkil Holm Petersen
Virkisøki: Tólbúnaður, net- og datasamskifti og ritbúnaður










okkara royndir
- tín fyrimunur

Fíggjarloysnir
Formula.fo hevur verið Microsoft Business Solution Center síðan 1989. Tey 15 starvsfólkini á deildini hava royndir frá verkseting av meira enn 500 loysnum og harvið hollan kunnleika til marknaðartørvin í Føroyum

Net- og samskiftisloysnir
Formula.fo er einasti Microsoft Certified Partner í Føroyum. Við hesum góðskustempli og drúgvum royndum innan bæði hardware og net, kunnu vit veita eina trygga og skjóta tænastu innan hesi øki – á staðnum ella við fjarsambandi

Skjalaskráir
Formula.fo hevur síðan 1996 veitt elektroniska skjalastýring til almennar stovnar og vinnuvirkir í føroyum. Í dag er Formula.fo fremsti og størsti veitari av skjalaloysnum í landinum.

EDV-loysnir til fiskivinnuna
Formula.fo hevur síðan 1986, í tøttum samstarvi við Marel í Íslandi, ment og selt edv-loysnir til fiski- og alivinnuna, bæði á sjógvi og landi

Skrivstovutól
Formula.fo hevur síðan 1980 umboðað Xerox í Føroyum. Við at leggja okkum eftir hesum eina heimsførandi merki hava vit arbeitt upp einastandandi serkunnleika til tólini, sum kemur kundanum til góðar sum skjót og góð tænasta

Serloysnir
Formula.fo hevur ment nógvar skipanir har standard loysnin ikki nøktaði tørvin hjá kundanum. Við vælútbúnum starvsfólkum, drúgvum royndum og framtíðartryggjaðum amboðum, kunnu vit bjóða skilabestu loysnina

formula.fo




Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo